

## Stjórar brúktu 2,75 mió kr.

Tað hevur skapt øsing millum viðhaldsfólkini hjá Liverpool, at teir báðir stjórarnir í felagnum, Tom Hicks og George Gillett Jr. hava nýtt 2,75 mió kr. úr kassanum hjá felagnum ferðing, juridiska ráðgeving og annað. – Tað var meiningin, at teir skuldu vera við til at menna felagið, og eitt nú lovaðu teir, at eitt nýtt stadion skuldi byggjast. Nú síggja vit, at felagið hevur eina milliardaskuld, og at eigararnir oman á tað heila nýta felagið at rinda privatar útreiðslur, sigur ein talsmaður fyri viðhaldsfólkini við enska Guardian.

## Bayern vil hava Bosingwa

Stjórin í týska Bayern Munchen, Uli Hoeness, váttar nú, at felagið roynir at keypa Jose Bosingwa úr Chelsea. Portugisiski landsliðsspælarin skifti til Chelsea í fjør, men nú tykist Allianz Arena at verða ein sannlíkur heimavøllur hjá honum. – Vit hava sum so keypt hópin, sum vit skulu hava. Tað einasta plássið, sum vit hugsa um nú, er á høgra bakki, og har er Bosingwa heilt víst ein spælari, sum vit hava hug á, sigur Hoeness týska TZ.

Unglingafinalan: EB/Streymur – B36 0-3 (0-1)

# Samanspælið vann

*EB/Streymur*

*B36*

**Við trimum málum ímóti ongum vann B36 í gjár steypafinaluna hjá unglingum. Serliga stuttu avleveringarnar voldu EB/Streymi trupulleikar**

FÓTBÓLTUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*B36 kann annað árið á rað erpa sær av at hava Thomas Dam Intersport steypið í varðveitslu*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Eftir sjey ymiskar dystir í kvalifikatiónini var í gjár klárt at spæla finaluna um Thomas Dam Intersport steypið. Hetta er steypið, sum unglingar kunnu vinna.

Tað vóru EB/Streymur, sum hevur koppað B68 og NSÍ á veg í finaluna, og B36, sum hevur vunnið á KÍ, AB og HB fyri at røkka finaluna, sum hittust á Svangaskarði klokkan 19.30 í gjár.

Eitt fitt lot var eftir vøllinum, ikki so nógv, at tað órógvaði spælið, men ikki so lítið, at tað ikki gav fyrimun hjá liðnum undan vindinum.

Tá byrjað varð, spældi EB/Streymur niðan ímóti grasvøllinum, og tí hevði B36 undanvind.

B36 hevði eisini bóltin munandi meiri, Róaldur Jacobsen og Cristian í Garði høvdu gott tamarhald á miðjuni fyri B36og EB/Streymur rann mesta aftaná, meðan teir dúvaðu uppá at fáa nøkur skjótálop, tá teir vunnu bóltin.

### B36 framum

Tá næstan 20 minuttir vóru spældir av dystinum kom B36 framum. Hetta var væntandi, tí liðið úr Havn var alla tíðina fótin frammanfyri hesa fyrstu løtuna.

Uni Holm Johannesen fekk bóltin í høgru síðu, áðrenn hann legði bóltin innfyri. Innleggið hevði rætta hædd, men var dekan ov nær málinum. Tó so. Jákup Andreas Hansen fekk ikki bóltin, og tá Brynleif Hansen við aftaru stong stóð og svav, so var laga manni hjá høga Sjúrði Thomassen at nikka bóltin inn í málið.

Beint eftir hetta fekk Jens Michael Jensen ein stóran møguleika fyri EB/Streym, tá Terje Rasmussen var komin skeivt úr málinum og EB/Streyms vongurin royndi at fáa bóltin upp um hann. Millum onnur Rólant Højsted, formaður í EB/Streymi, helt, at málmaðurin hjá B36 hevði hendurnar á bóltinum uttanfyri brotsteigin, og tá gjørdi vart við hetta fleiri ferðir, varð hann vístur av vøllinum.

### 10 móti 10

Við regluni at gult kort merkir útvísing í 10 minuttir í unglingum, hendi tað tá einir 10 minuttir vóru eftir, at Brandur Nolsøe hjá B36 varð vístur av vølli í 10 minuttir. Nú fótaði EB/Streymur sær og fekk lagt trýst á B36, men hetta vardi bara stutta tíð, tí beint eftir varð Brynleif Hansen hjá EB/Streymi eisini vístur av vølli í 10 minuttir.

Seinasta møguleikan í fyrra hálvleiki átti B36, tá Sjúrður Thomassen gjørdist púra leysur, tí Andru Poulsen ikki rakti ein rímiliga léttan bólt.

### EB/Streymur møguleikan

Í seinna hálvleiki leikaði leingi rættiliga javnt á. EB/Streymur hevði nú undanvind, og hevði størri hepni við beinleiðis spælinum, tí B36 sýntist eitt sindur ørkymlað av støðuni.

Hetta hevði við sær, at Andru Poulsen tvær ferðir var nær við at nikka høgar bóltar inn í málið. Í hesi tíðini hevði B36 eisini ein risamøguleika, tá Høgni Eysturoy megnaði at skalla upp um tómt mál úr seks metrum, tá hann varð púra leysur eftir fríspark úr høgru síðu.

Nú vóru einir 10 minuttir eftir av dystinum og Olgar Danielsen, venjari hjá EB/Streymi, valdi at satsa við at taka ein verjuleikara út, so liðið nú spældi við trimum í verjuni.

Beinanvegin var hetta um at geva úrslit, tí Hans José Poulsen, sum helst var fysiskt besti leikarin á vøllinum, var komin inn og smekkaði ein bólt við útsíðuni av høgra beini á stongina. Men nærri kom EB/Streymur ikki einum máli.

### Staðfestu sigurin

Nú var tunt í verjupartinum hjá EB/Streymi, og hetta gjørdi B36 sær dælt av. Fyrst kiksaði Brynleif Hansen eitt innlegg, tá hann royndi at skalla ein lágan bólt, og so fylgdi Høgni Eysturoy upp, og skoraði.

Tá vanliga leiktíðin var farin staðfesti Benjamin Petersen sigurin, og so kundi staðfestast, at B36 fær Thomas Dam Intersport steypið fyri aðru ferð á rað.

## FAKTA um dystin

**EB/Streymur-B36 0-3 (0-1)**
Sjúrður Thomassen, 17.
Høgni Eysturoy, 79.
Benjamin Petersen, 90.
**Dómari**: Bárður Mortensen
**EB/Streymur:** Jákup Andreas Hansen – Pól G. Olsen, Brynleif Hansen, Andru Poulsen, Hallur Fláaberg – Hanus Olsen, Nils Fríðheim, Arnar Dam, Ólavur Eidesgaard, Jens M. Jensen – Ási Dam
**Gult kort:** Brynleif Hansen
**B36:** Terji Rasmussen – Brandur Nolsøe, Hjallgrímur Janusarson, Andreas Vestergaard, Ásmund Nolsøe – Uni H. Johannesen, Janus Mortensen, Cristian í Garði, Róaldur Jacobsen, Høgni Eysturoy – Sjúrður Thomassen
**Gult kort:** Brandur Nolsøe

## Vit vóru betri tekniskt

Høgni Eysturoy, liðskipari hjá B36, er sannførdur um, at sigurin var uppiborin.

- Vit eru betri mann fyri mann. Vit spæla nógv betri, men teir høvdu eitt skot á stongina, so teir vóru eisini raskir, sigur hann.

Í dystinum runnu EB/Streymsleikarar meiri eftir bóltinum, enn at hava hann.

- Vit eru nokk betri fyri tekniskt enn teir, og tí ber hetta til, staðfestir Høgni Eysturoy, sum hevur góðar vónir fyri restina av árinum hjá unglingunum hjá B36.

-eij

## Møttu betri liði

- Vit gjørdu okkara, men vit møttu einum betri liðið, hóast vit høvdu onkran møguleika, men teir vóru betri, sigur Andru Poulsen, liðskipari hjá EB/Streymi.

Hinvegin hevði EB/Streymur millum annað eitt skot á stongina, tá bara eitt mál var á muni.

- Høvdu vit fingið eitt mál, so hevði dysturin verið púra opin, men bólturin vildi ikki inn, sigur Andru Poulsen.

Spurdur um hann framvegist verður keddur, tá hann fer í song, er hann rættiliga avgjørdur.

- Eg fari í hvussu so er ikki glaður í song, staðfestir hann.

-eij